

www.oljan.fo

**Jan Müller** 09 - 01 - 2013

# Shell pallur leysur aftur í Alaska

Tað, sum kundi verið til eina umhvørvisvanlukku í Alaska, gjørdist tíbetur til eina álvarssama ávaring um, hvussu sjálvt nútímans tøkni kann svíkja. Shell boðar nú frá, at Kulluk boripallurin er leysur aftur og verður nú togaður í tryggari sjógv við Kodiak oynna í Alaska. Tað var tá ein sleipibátur, sum togaði Kulluk, fekk maskinbrek, at boripallurin rak á land í ringum veðri. Vandi var fyri, at hol kundi koma á oljutangarnar umborð, men tað hendi ikki, og Shell slapp við skelkinum. Pallurin, sum skuldi brúkast til oljuboring norðan fyri Alaska í fjør var ávegis til Seattle, har hann skal gerast klárur til at fara undir aftur boring í summar. Sambært CBS News er eingin olja likin í havið. Óhappið kemur illa við hjá Shell, sum í fleiri ár hevur gjørt seg út til at bora í arktisku økjunum norðan fyri Alaska. Umhvørvisfeløg vilja vera við, at felagið hóast dýra fyrireikingar, als ikki kann tryggja, at nýggj óhapp ikki kunnu henda. Spurningurin er nú, um myndugleikarnir í Alaska fara at seta Shell nýggj krøv. Felagið hevur brúkt meira enn 20 milliardir krónur seinastu árini uppá at fyrireika boring í Arktis.